# Todi møtir ungum fjepparum

**Sum kendasti og helst besti føroyski fótbóltsleikari nakrantíð, er Todi fyrimynd hjá nógvum ungum fótbóltspælarum í Føroyum, ið ganga við dreyminum um at blíva yrkisleikari**

ÍTRÓTTUR

*Orð og Myndir: Erla Torvadal og Bjørk Maria Krog Olsen, praktikantar*
*redaktion@sosialurin.fo*



*Todi Jónsson var vertur fyri móttøku í Eik í gjár fyri ungum føroyingum*

Sum smádrongur spældi Todi Jónsson við KÍ. Umhvørvið setti spurnartekin til, hví hann nýtti alla sína tíð uppá fótbólt, tá eingin vón var fyri framman. Todi var tvørur, helt við sítt og fór niður til Danmarkar sum 21 ára gamal at royna seg sum yrkisleikara. Tað tók honum trýkvart ár at koma á støðið, sum donsku javnaldrarnir vóru, greiddi hann frá á móttøkuni í Eik í gjár fyri ungum føroyingum.

Hóast heimliga umhvørvið hvørki trúði ella stuðlaði honum í vónunum um yrkisleiðina, so eru øll fegin um, at hann er komin so langt í dag, heldur Todi, ið leggur leggur serligan dent á, at tey ungu skulu trúgva uppá seg sjálvan.

Størsti siðurin á yrkisleið hansara, var ikki tá hann skoraði mál famman fyri túsundtals áskoðarum, men tá hann í treiskni fór fram ímóti og megnaði tað, sum umhvørvið helt vera ómøguligt.

Todi hevði ein dreym og megnaði at liva hann út, og tí er hann ein fyrimynd fyri aðrar ungar fótbóltsleikarar í Føroyum.

Tað eru ein 15 lið á Amager, og Todi væntar, at liðini fara at leggja seg saman til eitt stórt lið, sum fer at kallast FC Amager í 2008. 35 ára gamli Todi Jónsson, hevur nú saman við øðrum stovnað eitt nýtt felag á Amager. Tað búgva umleið 200.000 fólk á Amager, ið sostatt kann gerast eitt spennandi umhvørvi fyri ungar leikarar, ið ynskja at gerast yrkisleikarar.

- Teir sum hava ynski um at royna seg í Fremad Amager skulu bara halda seg framat og vísa, hvat teir duga í Føroyum fyrst. So er møguleikin altíð til staðar at koma til Danmarkar, sigur Todi Jónsson.

Hann vísir á, at tað er hørð kapping um at gerast yrkisleikari í donskum fótbólti, og at føroysku leikararnir altíð vilja hava teir ungu donsku leikararnar at kappast við.

Málið hjá Fremad Amager er flyta upp í Superligaini í 2010. Eydnast hetta ikki, er ikki ætlanin at gevast á hondum, men klára tað seinni.

Todi Jónsson vísir á, at fyri at røkka hesum máli, krevst eitt stað millum 10 og 30 mió. kr., og sambært føroyska yrkisleikaranum, er tað als ikki ómøgulig at útvega eina slíka upphædd. Hann vil ikki siga, hvussu nógv felagið eigur á kistubotninum.

Sjálvt um Todi Jónsson ikki er nøgdur við tey stóru tapini hjá føroyska landsliðnum, heldur hann ikki, at føroyingar eiga at geva upp.

Á tíðindafundi í Eik í morgum segði Todi Jónsson, at ætlanin er, at Fremad Amager skal virka sum ein klekistøð fyri ungar føroyskar fótbóltsleikarar. Í fyrstu atløgu er ætlanin at fáa fýra ungar føroyingar knýttar at felagnum.



*Eini 20 ungir føroyingar vóru komnir at lurta eftir Toda Jónsson, tá hann greiddi frá sínum dreymum um at gerast yrkisleikari og megnaði hetta*

# Umsetningurin skal trífaldast

**Tað er ein stór uppgáva, sum nýsetti stjórin hjá Fremad Amager, Nicolai Kaas-Heilmann, hevur fnigið. Men sjálvur ivast hann ikki í, at málið kann røkkast**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrstu tveir arbeiðsdagarnar í nýggja felagnum hevur Nicolai verið til arbeiðis í Føroyum. Her hava hópatals fundir verið á skránni, og hóast byrjanin kann tykjast strævin, so slær nýggi stjórin fast, at hann ivast ikki í, at Fremad Amager hevur møguleikan at blanda seg millum tey stóru í Danmark. Tí, sum hann tekur til, annars var hann ikki farin í starvið.

- Eg valdi at taka av tilboðnum, tí eg síggi stórar møguleikar í hesum. Eg skilji kanska ikki so nógv føroyskt, men eitt orð, sum gongur aftur og aftur, er potentiali. Og júst hetta er orsøkin til, at eg tók av. Møguleikarnir at gera eitt stórt felag á Amager eru avgjørt til staðar. Ikki minst, tí baklandið er somikið stórt.

## Skal trífaldast

Fremsta uppgávan hjá nýggja stjóranum verður at styrkja grundarlagið undir felagnum. Ikki minst fíggjarliga skal felagið gerast sterkari. Seinasti almannakunngjørdi roknskapurin sýnir, at samlaði umsetningurin hjá felagnum var góðar 3 mió kr., og hetta er eitt tal, sum skal lyftast, sigur Nicolai.

- Í longdini skulu vit helst upp at takast við tey heilt stóru, og tá eru tað so heilt aðrar upphæddir, sum vit tosa um. Men fyri at halda eitt superligustøði, skulu vit helst upp á 10-15 mió kr. Vanliga verður sagt, at ein uppflyting í sjálvum sær økir umsetningin við einum 5 mió kr., men tað merkir so eisini, at verandi umsetningurin helst skal trífaldast innan rímiliga tíð.

Og er tað eitt mál, sum kann røkkast innan tvey ár?

- Tað ivist eg ikki í. Áhugin her í Føroyum hevur verið stórur, og eisini í Danmark hevur talan verið um sera gott pr fyri felagið hesa fyrstu tíðina. Fyri meg kann eg í øllum førum siga, at eg ongan tíð áður havi uppliva, at sponsorar sjálvir venda sær til felagið við umbøn um at gerast sponsorar. Men tað havi eg longu nú upplivað her hjá Fremad Amager, so byrjanin sær í øllum førum heilt góð út, sigur altso nýggi stjórin í Fremad Amager.




*Áðrenn felagið veruliga skal bjóða superliguni av, skal nýggi stjórin virka til at styrkja um fíggjarliga og fyrisitingarliga grundarlagið undir Fremad Amager*

*Mynd: Jens Kr. Vang*